# Próvtøkur Tekniska Skúlanum í Klaksvík

### Elektrikarar

Hesir fýra á myndini hava lært til elektrikara á tekniska skúla. Teir eru frá vinstru: Kristian Biskopstø Andreasen, Klaksvík, lært hjá EL-IN, Hans Sólbjørn Olsen, Klaksvík, lært hjá Tummas Thomsen, Dávur Johannesen, Klaksvík, lært hjá EL-IN og Lindi í Gerðum, Syðrugøtu, lært hjá EL-Talvuvirkinum.





### Maskinsmiðir

Maskinsmiðir f.v.: Ólavur Jacobsen, Klaksvík, lært á Klaksvíkar Sleipistøð, Frank Matras Scmith, Viðareiði, lært hjá KJ-Hydraulik, Búgvi Rosendal Gregersen, Strendur, lært á Skipasmiðjuni á Skála, Karsten Joensen, Klaksvík, lært á Klaksvíkar Sleipistøð, Petur Hendrik Reinert Djurhuus, Strendur, lært hjá United Seafood Toftir, Sjúrður Lómstein Petersen, Oyndarfjørður, lært hjá KJ-Hydraulik, Hallstein Eivindarson Jacobsen, Klaksvík, lært hjá Skarðhamar, Jákup Andreasen, Runavík, lært á Skipasmiðjuni á Skála, Rói Egholm, Klaksvík, lært í smiðjuni hjá Klaksvíkar kommunu og Búgvi Ólavsson Eliasen, Norðragøta, lært hjá FJM.



### Timburmenn

Timburmenn f.v.: Poul Johannes K. Joensen, Klakvík, lært hjá Buison, Johannes Hansen, Klaksvík, lært hjá Kanjon, Palli M. Biskopstø, Klaksvík, lært hjá Norðhús, Beinir Heðinsson, Klaksvík, lært hjá Kanjon, Finnbjørn Poulsen, Klaksvík, lært hjá Norðhús, Martin í Toft Simonsen, lært hjá Malltek, John Richard Klakkstein Thomsen, Klaksvík, lært hjá Norðhús, Ólavur Jacobsen, Klaksvík, lært hjá Norðhús, Gunnleivur Biskopstø, Klaksvík, lært hjá Kanjon, Jan Niclassen, Runavík, lært hjá Articon og Gunnar Egholm Jacobsen, Klaksvík, lært hjá Alfa-Smíð

# Próvtøkur á Klaksvíkar Sjómansskúla



### Sjóvinnuflokkurin

Sjóvinnuflokkurin. **Aftara rað f.v:** Michael Borgardal, Poul Eli Jóhannesen, Niels Johansen, og Anton Nielsen. **Fremra rað f.v.:** Jánn í Giljum, Jóhannus Zakariasen, Jógvan Johannesen, Jónleif Kass, Robert Vardum og Egil Olsen. Teir, sum vanta á myndini eru: Sølvi Mortensen, Eliesar Jacobsen, Erik Egholm og Rúni Hansen.



### Kokkaflokkurin

Kokkaskúlin. **Aftasta rað f.v.:** Eyðbritt Holm, Ruth Lisberg, Jón Dahl- Jacobsen, Rúnar Rygshamar, og Mona Lisberg. **Fremra rað f.v.:** Lív Jónsdóttir, Símun Petur Midjord, Lilja Hansen og Randi Jespersen

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Johannes (Hannis) Danielsen**

andaðist og var jarðaður.

Takk til starvsfólkið á Eldrasambýlinum oman Mattalág, sum vóru um hann í tí dagliga. Hjartans tøkk til Frelsunarherin fyri vitjan heima, og fyri luttøku við jarðarferðina. Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávur til Frelsunarherin. Takk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina. Takk til tykkum øll, sum fylgdu Hannis til hansara hansara seinasta hvíldarstað. Eisini vilja vit ynskja tykkum eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi árið.

*Familjunnar vegna*

**Lena og Jóhannes v/ fam.**

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Frithiof Olsen**

doyði og var jarðaður.

Vit vilja fegin takka øllum fyri alla forbøn og allan stuðul, meðan hann var sjúkur, og øllum tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu og stuðlaðu til við jarðarferðina og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstaðs her.

*Gleðilig jól og signað nýggjár øll somul.*

*Ynskja*

**Magnhild**

**Hans Arni, Súsanna, Kári, Birgir, Jógvan og Hanna v/ fam.**

# Tøkk

Vit vilja á henda hátt hjartaliga takka fyri ta ómetaligu stóru hjálp og samkenslu vit fingu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Pauli Lassen**

vanliga nevndur Grethepauli

andaðist og fór til gravar.

Tað er ómetaliga ringt at taka nakran fram um í tí stóra skara, sum fylgdi honum, bæði úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum, úr kirkjuni, og sum vóru við til ervið, men eina hjartans tøkk vilja vit tó bera limunum í »Orðið á borðið«, sum mintust hann so virðiliga. Eisini takk til Ljóm fyri sangin og fyri gávur til Meinigheitshúsið.

*Eisini vilja vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.*

**Gretha**

**Agnes, Elisabeth, Dora, Eli, Sivar og Oluffa**